# Óvist hvussu leingi Smyril fer at rulla



*Sjálvt um Strandferðslan vónar tað besta, vænta tey ikki, at brekið við stabilisatorunum kann umvælast ímeðan Smyrli Liggur í sjónum. Men fyribils sær ikki út til, at Smyril sleppur í dokk fyrrenn síðst í apríl. Spurningurin um avloysaraskip skal eisini avgreiðast*

**Strandferðslan væntar, at Smyril noyðist í dokk at gera stabilisatorarnar, men tað sleppur hann ikki, fyrrenn um ein góðan mánað**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er framvegis ógreitt, hvussu leingi Smyril fer at rulla so illa, sum hann ger í løtuni.

Tað eru nú tvær vikur síðani, at tey varnaðust, at ein flansi, sum helt einum pakningi í stabilisatorunum, var farin í báðum borðum og at stabilisatorarnir lóku olju.

Fyri ikki at taka nøkur óráð fyri og gera skaðan verri, varð gjørt av at lata vera við at brúka stabilisatorarnar, til greiða var fingin á støðuni.

Men hetta hevur ført við sær, at við ongum stabilisatorum, hevur Smyril rulla nógv verri enn vanligt.

Harafturat hevur veðrið verið ringt og sostatt eru eisini fleiri fráferðir avlýstar og í gjár sigldi Smyril slett ikki, tí hann hevði rullað so illa, at tey hildu ikki, at tað var ráðiligt at sigla við fólki og bilum. Tað var ikki tí at nakar sum helst vandi var á ferð, at ferðir eru avlýstar, men tað er neyðugt at taka serlig atlit at ferðafólki og tungum flutningi, segði Strandferðslan.

## Bíða eftir fólki

Men enn ber ikki til at siga nakað um, nær í brekið verður rættað.

Virkið, sum hevði gjørt stabilisatorarnar, skuldi senda fólk til Føroya at kanna brekið, men tey fólkini eru ikki komin enn.

So nú hevur Strandferðslan rykt eftir at vita, nær tey koma og hevur samstundis kravt, at tey koma beinanvegin.

Umboðini fyri framleiðaran skulu so kanna brekið og vita um tað ber til at umvæla tað, ímeðan Smyril liggur í sjónum.

- Framleiðarin kennir ikki til hetta slagið av brekið og tí eru eisini tey eitt sindur óviss um, hvussu farast skal fram, fyrrenn brekið er kannað, sigur Niels Juel Arge, stjóri á Strandferðsluni.

Kortini metir hann, at sum tað sært út, eru smá útlit fyri, at tað kann umvælast, ímeðan Smyril er í sjónum og tí stúratey fyri, at tað verður neyðugt at senda hann av landinum í dokk.

- Vísir tað seg at brekið kann umvælast, ímeðan Smyril er í sjónum, verða tað óvæntað góð tíðindi, sigur Niels Juel Arge.

## Ringt at sleppa í dokk

Men samstundis, sum bíðað verður eftir fólkinum frá verksmiðjuni, kannar Strandferðslan, hvar Smyril kann sleppa í dokk sum skjótast.

Men tað er lættari sagt enn gjørt, staðfestir stjórin á Strandferðsluni.

- Vanliga hava dokkirnar nógv at gera hesa tíðina, tí nógv skip brúka hesa árstíðina til at gera klárt til sumarsiglingina, sigur Regin Vágadal, sum er rakstrarleiðari hjá Strandferðsluni.

Hann sigur, at tað, sum fyribils liggur í kortunum, er, at Smyril sleppur ikki í dokk fyrrenn síðst í apríl, ella um ein góðan mánað.

Men um hann kann fara í dokk tá, er óvist, tí tað verður neyðugt at útvega avloysaraskip ímeðan hann er í dokk.

Og tað hevur ikki enn eydnast at finna eitt hóskandi skip, hóast nakrir møguleikar eru.

Annars skuldi Smyril í dokk í nakrar vikur í september og tá varð avtalað gjørd um at leiga ferjuna St. Ola úr Estlandi, at loysa av.

Hon hevur loyst Smyril av fyrr, men hon er ikki tøk nú, sigur Niels Juel Arge.

fer Smyril í dokk nú, er ætlanin at gera sum mest so at hann sleppur undan at fara í dokk aftur í september, sum ætlanin annars var.

Annars er tað heldur ikki greitt, hvør skal gjalda fyri brekið við stabilisatorunum.

Vanliga trygdin frá verksmiðjuni er bara eitt ár.

Men Regin Vágadal sigur, at Strandferðslan fer at tryggja sær, at onki er galið við tilfarinum ella okkurt líkandi brek er, sum eigur at føra við sær, at framleiðarin eigur at taka umvælingina á seg, hóast trygdin frá verksmiðjuni bara er eitt ár.

Av tí, at tað enn er óvist, hvussu brekið kann rættast, er samstundis eisini ómøguligt at vita, hvussu nógv tað fer at kosta.

# Kortanei til sosiala dumping í Føroyum

**Føroya Arbeiðarafelag fer at seta sum ófrávíkiligt krav, at teir útlendingar, sum koma til Føroyar at arbeiða, skulu arbeiða eftir føroyskum sáttmálum**

ÚTLENDSK ARBEIÐSMEGI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit fara ikki at góðtaka, at vit fáa sosiala dumping í Føroyum.

Á aðalfundinum hjá Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið, staðfesti forkvinnan í felagnum, Ingeborg Vinter, at tað verður ikki treytaleyst at tey fara at góðtaka, at útlendsk arbeiðsmegi kemur til Føroyar at arbeiða.

Hon staðfesti, at tað er stórt trýst á fyri at fáa útlendingar til Føroyar at arbeiða, kanska serliga á fiskavirkjunum kring landið.

- Arbeiðsgevarar tvíhalda um, at tað er so stórt trot á fólki, at tað er neyðugt at vildi fáa útlendingar hendavegin at arbeiða.

Hetta er serliga galdandi í fiskivinnuni, men tað er eisini galdandi í øðrum vinnum, legði hon afturat.

## Mugu hava fulla trygd

Men hesum hevur Føroya Arbeiðarafelag fyribils sett seg ímóti.

Landsstýrismaðurin í innlendismálum hevur boðað frá, at hann arbeiðir við eini kunngerð, har tað verður staðfest, undir hvørjum treytum, útlendingar kunnu koma til Føroyar at arbeiða.

Og arbeiðarafeløgini hava gjørt greitt, at tað ber ikki til at taka útlendingar hendavegin í stórum tali, fyrrenn ætlaða kunngerðin um útlendingar er liðug og lýst.

- Tað er neyðugt, at vit vita, hvat kunngerðin fevnir um og hvørjar treytirnar verða, sigur Ingeborg Vinther.

Og tað, sum hon heldur, er serliga umráðandi, er tað, at vissa fæst fyri, at teir útlendingar, sum koma higar at arbeiða, skulu arbeiða eftir galdandi sáttmálum í Føroyum og at teir gerast limir í fakfeløgunum.

- Annars verður vónleyst hjá okkum at fylgja við, um galdandi sáttmálar verða hildnir, sigur Ingeborg Vinther.

- Áðrenn vit taka útlendingar í stórum tali higar, skulu vit tryggjað, at tað verður undir skipaðum viðurskiftum og vit mugu eisini tryggjað, at vit ikki fáa tað, ið rópt verður sosial dumping, sigur Ingeborg Vinther.

Tað merkir, at arbeiðarafeløgini fara ikki at góðtaka, at útlendingar koma hendavegin at arbeiða fyri løn, sum er lægri enn sáttmálalønin í Føroyum.

Men nú hevur mannarættindadómstólurin í Strasburg felt dóm, har tað er ólógligt at krevja, at fólk eru í fakfelag. Hvussu kunnu tit so krevja, at útlendingar, sum koma higar at arbeiða, skulu verða limir í føroyskum fakfelag

Tað er rætt og slætt ein spurningur, sum vit skulu finna útvegir fyri. Vit fara undir ongum umstøðum at góðtaka, at útlendingar koma higar at arbeiða fyri undirløn og sostatt knúsa okkara arbeiðsmarknað og øll tey rættindi, vit hava stríðst fyri í næstan eina heila øld.

## Føroyingar fyrsta rætt

Men hon vil eisini hava trygt fyri, at útlendingar ikki skúgva føroyingar til viks.

Áðrenn útlendingar koma hendavegin, mugu vit tryggja, at arbeiðsmegin, sum er í Føroyum, hevur trygd fyri arbeiðið, áðrenn útlendingar koma higar at arbeiða.

- Tað má ikki halda fram, at teir útlendingar, ið koma higar at arbeiða, skulu hava tryggjaða 40 tíma viku, tí eina slíka trygging hevur eingin tímaløntur arbeiðari í dag.

- Tað má fyrst av øllum vera so, at tann arbeiðsmegi, sum er í landinum, hava rætt til arbeiði, áðrenn vit fara út um landoddarnar eftir arbeiðsmegi, sigur Ingeborg Vinther.

Annars fegnast hon um, at Arbeiðsmarknaðarráðið er sett á stovn, sum skal ráðgeva landsstýrinum í spurningum um arbeiðsmegi, eisini í spurninginum um útlendska arbeiðsmegi í Føroyum.

- Áðrenn vit taka útlendingar í stórum tali higar, skulu vit tryggjað, at tað verður undir skipaðum viðurskiftum og vit mugu eisini tryggjað, at vit ikki fáa tað, ið rópt verður sosial dumping, sigur Ingeborg Vinther.